# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 21. juli 2009


# Veteranarnir vóru væl við

**Hóast teir eru væl eldri enn flestu av hinum súkklarunum, megna bæði Gunnlaugur Jónasson og Andrass Joensen væl og virðiliga at bjóða teimum yngru av**


SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*


Av teimum 19 súkklarunum, sum gjøgnumførdu Statoil Kring Føroyar hesa ferð, vóru tveir veteranar, íslendski Gunnlaugur Jónasson og føroyski Andrass Joensen. Tað vil siga, at teir eru 45 ár ella eldri, men tað sást nú ikki aftur á súkklingini.

Báðir stóðu seg sera væl samanlagt, og í einkultstartinum megnaði Gunnlaugur enntá at gerast nummar fýra í Klaksvík og nummar seks heima á Sandi.

Tá harðast leikaði á í Suðuroynni leygardagin, vóru teir á veg niðan á Hestin saman við fýra av teimum ungu íslendingunum, men hesir noyddust allir at boyggja seg og síggja Gunnlaug og Andrass fara undan sær.

– Tað er ikki so galið, tá vit báðir gomlu megna at seta teir ungu av og herja á víðari, segði Andrass Joensen seinnapartin í gjár, tá teir báðir høvdu verið uppi á sigurspallinum eftir steypum, blómum og virðislønum.

– Tíbetur eydnaðist mær at vinna á Gunnlaugi í spurtinum, so eg fekk veteransigurin í Suðuroynni. Og tað gjørdi tað ikki verri, at málið var í heimbygdini hjá pápa mínum, so eg var serliga glaður fyri sigurin.

Gunnlaugur Jónasson og Andrass Joensen vóru samanlagt ávikavist nummar sjey og átta, og í samlaðu veteranstøðuni vann Gunnlaugur á Andrassi við smáum trimum minuttum.

Men hóast teir eru kappingarneytar, samstarva teir eisini, og Gunnlaugur, sum er eitt slag av serfrøðingi í einkultstarti, hevur eisini givið Andrassi onkur góð ráð, ið hann kann brúka, tá hann er við til triathlonkappingar.

– Tá er talan í veruleikan um einkultstart, so vónandi fái eg nyttu av onkrum av tí, Gunnlaugur hevur lært meg hesar dagarnar, sigur Andrass, ið síðstu tveir mánaðirnar tó hevði vant mest á súkkluni, so hann skuldi vera væl fyri til Statoil Kring Føroyar.



**Andrass Joensen og Gunnlaugur Jónasson í endaspurtinum teirra millum í Vági leygardagin**
Mynd: Bergur Ingemarsson Johansen

**Statoil Kring Føroyar – fjallaspurtir**

| Nr. | Navn | Dagur 1 | Dagur 3 | | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Norðskála | Fámjin | Hesturin | tilsamans |
| 1 | Guðmundur Joensen | | 3 | 3 | 6 |
| 1 | Torkil Veyhe | 2 | 2 | 2 | 6 |
| 3 | Hafsteinn Ægir Geirsson | 3 | | | 3 |
| 4 | Árni Már Jónsson | 1 | | 1 | 2 |
| 5 | Gunnar Dahl-Olsen | | 1 | | 1 |

**Statoil Kring Føroyar – liðkapping**

| | | Dagur 1 | Dagur 2 | Dagur 3 | Dagur 4 | Samlað | Tíð eftir |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nr. | | Klaksvík | Eysturoy | Sandoy | Suðuroy | tíð | vinnara |
| **1** | **Team GTG** | **0:21:27** | **6:26:15** | **1:13:53** | **5:12:08** | **13:13:43** | **0:00:00** |
| | Torkil Veyhe | 0:10:30 | 3:13:06 | 0:36:30 | 2:36:03 | | |
| | Guðmundur Joensen | 0:10:57 | 3:13:09 | 0:37:23 | 2:36:05 | | |
| | Gunnar Dahl-Olsen | 0:11:22 | 3:13:09 | 0:38:39 | 2:40:02 | | |
| **2** | **HFR Team** | **0:21:23** | **6:26:15** | **1:14:30** | **5:25:17** | **13:27:25** | **0:13:42** |
| | Árni Már Jónsson | 0:10:51 | 3:13:09 | 0:37:50 | 2:37:44 | | |
| | Hafsteinn Ægir Geirsson | 0:10:32 | 3:13:06 | 0:36:40 | 2:47:33 | | |
| | Pétur Ragnarsson | 0:11:16 | 3:13:09 | 0:39:50 | 2:59:59 | | |
| **3** | **Team Hjólamenn** | **0:22:02** | **6:26:18** | **1:17:20** | **5:55:38** | **14:01:18** | **0:47:35** |
| | Gunnlaugur Jónasson | 0:10:44 | 3:13:09 | 0:37:56 | 2:55:39 | | |
| | Sigurgeir Agnarsson | 0:11:18 | 3:13:09 | 0:39:24 | 2:59:59 | | |
| | Hlöðver Sigurðsson | 0:11:41 | 3:13:09 | 0:41:34 | 2:59:59 | | |
| **4** | **Team KS-Timburhús** | **0:23:11** | **6:26:18** | **1:20:15** | **6:00:16** | **14:10:00** | **0:56:17** |
| | Andrass Joensen | 0:11:44 | 3:13:09 | 0:40:17 | 2:55:39 | | |
| | Morten Hansen | 0:11:27 | 3:13:09 | 0:39:58 | 3:04:37 | | |
| | Áslakkur Nesá | 0:12:04 | 3:20:55 | 0:41:40 | 3:07:30 | | |
| **5** | **Team EIK** | **0:23:31** | **6:27:24** | **1:25:48** | **6:40:30** | **14:57:13** | **1:43:30** |
| | Sverri Mohr Edvinsson | 0:11:24 | 3:13:09 | 0:42:55 | 3:05:13 | | |
| | Jóhann Brend | 0:12:07 | 3:14:15 | 0:42:53 | 3:35:17 | | |
| | Lars K. Thomsen | 0:13:13 | 3:32:54 | 0:45:36 | Ikki á mál | | |

*Skjótastu tvær tíðirnar á hvørjum liði hvønn dag telja við*

# Súsanna saknar fleiri kvinnur

**– Tað hevði verið stuttligari, um fleiri kvinnur vóru við, sigur Súsanna Skylv Sørensen, sum bara hevði eina aðra kvinnu at kappast við hesa ferð**




SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*


Súsanna Skylv Sørensen má sigast at gera væl vart við seg, har hon er. Á Oyggjaleikunum herfyri vann hon eitt silvurmerki í renning, og í gjár vann hon kappingina hjá kvinnunum í Statoil Kring Føroyar.

Ikki tí, har var ikki tann stóra kappingin hjá henni, tí tað vóru bara hon og Marin Ennistein Heinesen, ið umboðaðu kvinnurnar í súkklukappingini hesa ferð. Men, sum vant, gjøgnumførdi Súsanna og helt fleiri sterk mannfólk aftan fyri seg!

**Súsanna Skylv Sørensen og Marin Ennistein Heinesen vóru einastu kvinnurnar, sum vóru við í Statoil Kring Føroyar hesa ferð**
Mynd: Bergur Ingemarsson Johansen

– Eg eri væl nøgd við úrslitið hjá mær, og tað er hugaligt at kunna gera framstig her eisini. Men tað hevði verið stuttligari, um fleiri kvinnur vóru við, heldur hon.

– Tað eru fleiri aðrar, sum súkkla, so tað hevði verið gott, um tað lá fyri hjá onkrum teirra at vera við næstu ferð. Eg má bara royna at koyra undir tær, so vit verða fleiri í tali.

Hóast Súsanna vinnur heiðursmerki í bæði renning og súkkling, so er tað altso triathlon, ið er hennara høvuðsítróttargrein. Har skal hon bæði svimja, renna og súkkla.

– Men hóast tað, so fái eg sera nógv burturúr at vera við í Statoil Kring Føroyar. Eg læri nakað nýtt hvørja ferð, og mítt mál er fyrst og fremst at betra súkklingina hjá mær, sigur hon.

– Og allir menninir eru óførir at læra frá sær, so eg gleði meg til hvørja kapping av hesum slagnum. Alt tað kann eg so brúka og fáa nakað burturúr, tá eg kappist í triathlon.